# Politisk egoisma má ikki forkoma stórmálum

HANS PAULI STRØM
landsstýrismaður



**Vælferðarpolitisk stórmál eru á skrá hjá samgonguni at fremja í heyst – tí er hetta ein innilig áheitan á allar samgongulimir, um at taka viljan til at fullføra arbeiði við teimum politisku stórmálunum fram um valtaktiska politiska egoismu**

Tað var ein klók avgerð um eina góða semju, sum løgmaður og floksformenninir í samgonguni tóku í málinum um at skipa Føroyar sum eitt valdømi, so avgerðin fær gildi aftaná fyrstkomandi løgtingsval, og at Suðurstreym í millumbilinum fær eina størri umboðan við einum tinglimi aftrat.

Samgonguumboðini, sum eru ímóti einum valdømi, hava sagt, at tey kunnu liva við hesum, og taka tí undir við semjuni. Og sjálvandi eiga tey sum eru fyri einum valdømi, eisini at kunna taka undir við hesum. Tí hetta gevur øllum pørtum tað neyðuga skotbráðið til at fyrireika seg og innstilla seg til hesa víðgongdu broytingina í valskipanini.

Tey samgonguumboðini, sum kortini ikki vilja tað, mugu hava okkurt annað í kvittanum – okkurt taktiskt lokabragd - annars er tað ikki til at skilja. Tí um samgongulimir fara at svíkja semjuna, sum løgmaður og floksformenninir hava gjørt – eftir at málið hevur verið viðgjørt bæði á samgongufundi og í tingbólkunum - so stinga teir samgonguna í ryggin, ilt kemur millum flkkarnar, samgongan slitnar, nýval verður útskrivað – og øll stórmálini sum samgongan hevur eftir at fremja í heyst, detta niðurfyri.

Her eru nevnliga nógv og góð vælferðarpolitisk mál, sum ymisku landsstýrismenninir skulu leggja fram vegna samgongu okkara.

**Úr rúgvuni frá Almanna- og heilsumálaráðnum:**

- **Bústaðarpakkin:** Lutaíbúðalógin er á veg í tingið. Í oktober kemur nýggja bústaðarpartafelagið sum skal lætta um hjá veikum bólkum at fáa fígging, og samstundis veita pensjonistum orku- og bjálvingarstuðulslán. Í oktober kemur eisini leigulógin.
- **Fyritíðarpensjón:** Lægsta verður nógv hækkað, inntøkumarkið hækkað og mótrokningin lækkað – í tingið í næsta mánaða.
- **Barnaískoytisstuðul** til stakar uppihaldarar - er á veg í tingið.
- **Barnsins 1. sjúkradagur,** endurgjald til tímalønt - er á veg í tingið
- **Nýggj sjúkrakassaskipan:** lógin er á veg í tingið.
- **Nýggj tubbakslóg,** sum ger almenna rúmið í Føroyum roykifrítt, í tingið í okt.
- **Nýggj sálarsjúkulóg:** nýggj tíðarhóskandi lóg í staðin fyri 70-ára gomlu psykiatrilógina – í tingið síðst í sept.
- **Endurbúgving**: betri stuðul, sum skal gerast óheftur av inntøkuviðurskiftum hjá hjúnarfelaga – lógin er á veg í tingið
- **Frí koppseting**: lóg um at veita fólkapensjonistum ókeypis influensakoppseting

Hesar verklagslógir verða lagdar fyri tingið í næsta mánaða:

- **Sambýli til sálarsjúk** í Havn
- **Økisdepil fyri sinnisveik** í Suðuroy
- **Røktarheimsbygging** í Norðoyggjum

**Úr rúgvuni frá øðrum aðalráðum:**

- **Fastognarkeypilóg:** lóg sum ásetir krøv í smb. við húsakeypi og sølu – kemur seinni í heyst (Innlendismálaráðið)
- **Arbeiðsskaðartryggingarlóg:** nýggj lóg at nútímansgera reglur um trygd og upphæddir – kemur í sept. (Vinnumálaráðið)
- **Endurgjaldsábyrgd:** nýggj lóg við ásetingum um endurgjald til persónar, ið hava verið fyri skaða – kemur í heyst (Innlendismálaráðið)
- **Brúkaravernd:** Nýggj lóg um marknaðarføring og brúkaravernd – frá Vinnumálaráðnum í sept. (Vinnumálaráðið)
- **Nýggjar útbúgvingarlógir**: um miðnáms-, lærara- og pedagogútbúgving og lóg um Føroya Lærda Háskúla (Mentamálaráðið)
- **Nýggj eftirlønarskipan**: Lóg um uppsparing til eftirløn (Fíggjarmálaráðið)



**Onnur stórmál hjá landsstýrissamgonguni:**

- **Umhvørvisvernd:** Løgtingssamtykt um staðfesting av Kyotosáttmálanum og verju av osonlagnum (Løgmansskrivstovan)
- **Náttúruvernd:** Nýggj lóg um nýskipan av føroyskari náttúruvernd (Innlendismálaráðið)
- **Yvirtøka av vinnulóggávuni:** Løgmansskrivstovan og Vinnumálaráðið
- **Búskapargrunnur**: lóg um búskapargrunn til inntøkur frá einskiljingum og møgl. oljuvinnu (Fíggjarmálaráðið)
- **Sandoyartunnil**: lóg um fast samband millum Sandoy og Streymoy (Vinnumálaráðið)
- **Trygdarmiðstøð**: verklagslóg um nýggja trygdarmiðsstøð í Klaksvík (Fiskimálaráðið)
- **Kringvarpshús**: verklagslóg um útbygging av kringvarpshúsið í sortudíki (Mentamálaráðið)
- **Útlendingalóg**: broytingar reglunum í útlendingalógini um innflyting av arbeiðsmegi úr ES-londum (Innlendismálaráðið)
- **Kirkjulógir**: 7 løgtingslógir um kirkjuviðurskifti í smb. við yvirtøkuna av Fólkakirkjuni (Mentamálaráðið)

**Latið góðan samstarvsanda ráða**

Slitnar samgongan nú í heyst, detta øll hesa góðu politisku stórmálini niðurfyri. Tað hevði verið ein sonn vanlukka. Tað kann ein og hvør skilja, sum hyggur henda langa listan ígjøgnum. Og tað hendir, um samgongulimir ikki vilja fylgja teirri skilagóðu semju, sum er gjørd millum løgmann og formenninar í samgongu-flokkunum.

Latið okkum heldur øll í samgonguni sleppa allari valtaktiskari politiskari egoismu, og leita tann framúr góða samstarvsandan framaftur, sum higartil hevur rátt okkara millum í hesum samgonguskeiðinum. Hesin samstarvsandin hevur givið megnarúrslit í framdum avrikum á øllum økjum, og lat okkum halda á hetta árið út, so vit eisini kunnu fullføra okkara arbeiði við eisini at fremja hesi politisku stórmálini, sum eru á okkara skrá í heyst.

Vestmanna, tann 25. aug. 2007

# Líkasælan á umhvørvisøkinum

HERGEIR NIELSEN



Eingi útlit eru til, at átrokandi mál fáast frá hondini, og skjýtur Tjóðveldisflokkurin ma. upp, at vit sum skjótast fáa avgreitt nøkur av sáttmálabundnu viðurskiftum okkara mótvegis útlandinum.

Tað kann skjótt gerast ein størri smeitur fyri okkum, um vit ikki seta í verk og fylgja teimum altjóða sáttmálum, sum vit hava samtykt at seta í verk og fylgja.

Víst verður ma. til uppskotini um lívfrøðiligt margfeldi og Kyoto-frumskjalið, sum bæði vóru reist í farnu tingsetu.

**Lívfrøðiligt margfeldi**

Løgtingið samtykti í fjør at fylgja sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi og at lýsa margfelda lívið í føroysku náttúruni.

Tíverri røkist einki fyri, at vit í heila tikið ætla okkum at halda altjóða skyldur okkara á hesum øki.

Tað tekur fleiri ár at savna neyðugu vitanina, og einki røkist fyri, at fakligur førleiki verður settur av til hetta arbeiðið.

Løgtingið hevur fyri aðru ferð samtykt at fylgja síni egnu samtykt í hesum sáttmála, og heitt á landsstýrið um at lýsa margfelda lívið í føroysku náttúruni.

Landsstýrið liggur tíverri framvegis ímóti løgtingsins vilja á málinum og sáttmálabundnu skyldum okkara mótvegis útlandinum.

**Kyoto - frumskjalið**

Løgtingið feldi uppskotið um at seta altjóða sáttmálan um umhvørvisvernd, Kyoto-frumskjalið, í gildið, vísandi til, at landsstýrið arbeiddi við málinum.

Sáttmálin liggur tíverri framvegis óvirkin, tí at landsstýrið fær ikki tikið seg saman til at fylgja honum.

Føroyar liggja í atgerðarloysi á umhvørvisøkinum og eru á ongan hátt partur av teimum framtøkum, sum grannalondini og flest øll heimsins lond eru partar av.

Veðurlagsbroytingarnar ávirka vistskipanirnar á sjógvi og landi kring allan knøttin, og Føroyar merkja eisini hesar veðurlagsbroytingar á ymsan hátt.

Tjóðveldisflokkurin hevur mælt til, at landsstýrið tekur upp samráðingar beinleiðis á millumtjóðastøði til tess at áseta egna kvotu og binda okkum beinleiðis mótvegis altjóða stovnum

Skotið verður nú upp av nýggjum, at løgtingið tekur hetta stigið.

Tað áliggur okkum sum tjóð at taka umhvørvislig og menniskjalig atlit og at vísa, at vit eisini taka fulla ábyrgd av, at okkara eftirkomarar fáa møguleikan at liva eitt virðiligt lív í reinum umhvørvi.

Tað er bæði átaluvert og óheppið, at landsstýrið framvegis stendur á berum, tá tað um slík átøk ræður. Einki fyrireikingararbeiði er gjørt í mun til eitt samskipað átak á økinum, og teir ymsu landsstýrismenninir hava ongar avtalur gjørt, og eingin ætlan av nøkrum slagi er tøk.

Meðan vit liggja sjóvarfallið av okkum hevur ES hevur orðað nýggja dagsskrá um avmarking av $CO_2$ útlátinum við upp til 30%.

Vit hava ongan rætt til at gykla fyri okkum sjálvum og umheiminum, at landsstýrið arbeiðir við einum ávegis máli um umhvørvisvernd, sum onnur lond fyri nógvum árum síðan hava avgreitt og eru ávegis nýggjum málum.

Vit noyðast at staðfesta, at Føroya Landsstýrið ikki tekur hóttanina móti umhvørvinum í álvara, og at løgtingið tí eigur at taka um endan og vísa hesum atgerðarloysi frá sær.

Henda mannminkandi støða kann koma Føroyum og føroyingum aftur um brekku í altjóða samfelagnum, og mæla vit tí til at raðfesta umhvørvismálini av nýggjum við einum umhvørvisvinarligum og samhaldsføstum hugburði.